# Tað kókar í Fuglafirði

**VODAFONEDEILDIN** Tá ið HB sunnudagin hevur møguleika at leggja lunnar undir enn eitt FM heiti, hava fuglfirðingar møguleika fyri fyrstu ferð at lata dyrnar upp fyri sær sjálvum út í Europa

Uni Holm Johannesen




*HB hevur mangan havt tað trupult í Fuglafirði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá ið HB sunnudagin fer norður til Fuglafjarðar, verður setningurin at vinna og harvið undan síðsta umfari at telva seg í eina fína støðu, sum kann bera við sær, at HB á heimavølli um eina viku í granna-uppgerð ímóti B36 kann endurvinna FM heitið.

Endin á hesum kappingarárinum fær næstan ikki verið betri hjá HB, sum við fýra stigum í tveimum dystum kann tryggja sær 21. FM heitið, eftir at tað inntil fyri ikki so nógvum vikum síðani ikki sá so bjart út.

– Hetta verður ein lykladystur. Vit skulu í hvussu so er hava fýra stig burturúr tveimum teimum seinastu umførunum, staðfestir HB veteranurin Andrew av Fløtum.

Og hvussu verður?

– Hjá okkum ræður um at fokusera á stóru avbjóðingina, nú fleiri spælarar hava verið burtur frá venjing, tí teir hava verið uppttiknir av landsliðnum. Úrslitið var gott týskvøldið, men nú er neyðugt at sleppa tí avrikinum og fult og heilt at savna seg um avbjóðingina í Fuglafirði. Har hava vit altíð havt tað torført. Vøllurin er smalur og kompaktur, og harvið eru umstøðurnar heilt øðrvísi, enn tær eru á okkara heimavølli, sigur Andrew av Fløtum.

### Fara eftir øllum

Hjá ÍF hevur kappingarárið verið betri, enn tað ofta hevur hilnast hjá fuglfirðingum, sum ikki so sjáldan hava havt hóttanina av niðurflyting hangandi yvir sær. Men myrki skuggin av taptu steypafinaluni hongur yvir ÍF, og nú er tað greitt, at tað er eingin møguleiki at vinna heiðursmerkir.

Kortini hava Abraham Løkin og hansara menn nógv at spæla fyri. ÍF hevur ongantíð áður luttikið í europeisku kappingunum. Europeisku atgongumerkini hómast framvegis í sjónarringinum, og um tað skal eydnast ÍF at sleppa upp í part í dreymalandinum, so er fyrsta treytin, at ÍF vinnur fulla úrtøku ímóti HB. Harvið verður sannlíkið størri fyri, at FM heitið ikki endar í Gundadali, men norðuri við Margáir. Um tað verður úrslitið, so fær ÍF europeisk atgongumerki sum tapari í steypafinaluni.

Tað er hetta roknistykkið, sum fuglfirðingar vilja hava at ganga upp, og tí er einki at siga til, at tað prutlar í Fuglafirði, har teir í ár hava góðar royndir á heimavølli ímóti HB. Í 8. umfari, sum var 16. mai, vann ÍF heimadystin ímóti HB 2-1. Øssur Dalbúð og Andy Olsen skoraðu fyri heimaliðið, sum var greitt omaná, inntil Rógvi Poulsen eitt korter undan leikloki minkaði um munin, og so var tað heilt spennandi síðsta korterið.

– Vit vunnu fyrra dystin í ár, og seinna dystin í fjør á heimavølli ímóti HB vunnu vit 3-0. Tí halda vit okkum hava takið á teimum her norðuri, og vit fara eftir sigrinum hesa ferð, sigur ÍF toppskjúttin Øssur Dalbúð.

## HB haltar

Skaðalistin er langur undan hvørjum umfari, men tað plagar at hilnast væl við fólki hjá HB, tá ið tað stendur á.

Síðuspælararnir Rógvi Poulsen og Símun Samuelsen hava verið sera týdningarmiklir í ár. Símun Samuelsen var væl upplagdur týskvøldið á Svangaskarði. Spenningurin í HB er nú, um hann verður førur fyri at spæla í Fuglafirði. Tað er hælsinan, sum tað er galið við.

Rógvi Poulsen hevur ikki vant saman við hinum tvær tær seinastu vikurnar. Hann hevur runnið fyri seg sjálvan, men teir vóna tað besta.

Umframt Símun hava Fróði Benjaminsen, Hendrik Rubeksen og Tórður Thomsen verið upptiknir av landsliðnum. Fróði og Hendrik fara at spæla sunnudagin. Um Tórður Thomsen verður millum stólparnar er meiri ivasamt. Tá ið hann var sjúkur herfyri, setti Julian Hansen Marcin Dawid í málið, og hann hevur staðið seg væl.

uni@sosialurin.fo

# Vónin er kveikt í Vági

**VODAFONEDEILDIN** Eftir heimasigurin á toftamonnum hevur FCSuðuroy møguleika at lyfta seg nærri bjargingini, tá ið Víkingur kemur at vitja

Uni Holm Johannesen



*savnsmynd*

Leingi sá tað svart út. Men nú tað resta tvey umfør, er bjargingin hjá FC Suðuroy bara eitt stig burtur. Fýra stig eru komin til høldar tvær tær seinastu ferðirnar, og um tað eydnast at vinna eitt stig meiri burturúr tveimum teimum síðstu umførunum, enn tað eydnast sandoyingum at vinna, so fara suðuroyingarnir eisini í 2011 at spæla í bestu deildini.

Hjá FC Suðuroy er Heini Bech leikbannaður hesa ferð, og Martin Tausen er tøkur aftur eftir leikbann.

Víkingur spælir framvegis fyri europeiskari luttøku. Hesa ferð er vongverjin í høgru Sverri Jacobsen leikbannaður.

– Um tað eydnast okkum at vinna á Vágseiði, so kann tað fara at laga seg soleiðis, at tað í síðsta umfari í Sarpugerði verður finala um europeiskt pláss, tá ið ÍF kemur at vitja. Tað hevði verið fínur endi á kappingarárinum hjá okkum, staðfestir Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi.

## Dystir um vikuskifti:

### Vodafonedeildin, 26. umfar

Allir dystirnir verða spældir sunnudagin 17. oktober 2010, kl. 14.45

| | | |
|---|---|---|
| **ÍF - HB:** | í Fuglafirði | Lars Müller |
| **B36 - NSÍ:** | í Havn | Eiler Rasmussen |
| **B71 - EB/Streymur:** | á Sandi | Páll Augustinussen |
| **FC Suðuroy - Víkingur:** | í Vági | Ransin Djurhuus |
| **B68 - AB:** | á Toftum | Petur Reinert |

### 1. deild, 27. umfar

Allir dystirnir verða spældir leygardagin 16. oktober 2010, kl. 14.30

| | | |
|---|---|---|
| **HB - FC Hoyvík:** | í Havn | Dagfinn Olsen |
| **TB - NSÍ:** | á Sevmýri | Ransin Djurhuus |
| **KÍ - B68:** | í Klaksvík | Bárður Mortensen |
| **07 Vestur - Víkingur:** | í Sørvági | Rói Jacobsen |
| **EB/Streymur - AB:** | í Streymnesi | Alex Troleis |

### Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 25 | 14 | 6 | 5 | 45 | 30 | +15 | 48 |
| 2 | EB/Streymur | 25 | 12 | 9 | 4 | 58 | 29 | +29 | 45 |
| 3 | NSÍ | 25 | 13 | 6 | 6 | 50 | 30 | +20 | 45 |
| 4 | Víkingur | 25 | 11 | 7 | 7 | 41 | 32 | +9 | 40 |
| 5 | ÍF | 25 | 11 | 7 | 7 | 46 | 38 | +8 | 40 |
| 6 | B36 | 25 | 10 | 7 | 8 | 41 | 33 | +8 | 37 |
| 7 | B68 | 25 | 7 | 7 | 11 | 38 | 44 | -6 | 28 |
| 8 | B71 | 25 | 5 | 8 | 12 | 23 | 52 | -29 | 23 |
| 9 | FC Suðuroy | 25 | 5 | 7 | 13 | 33 | 51 | -18 | 22 |
| 10 | AB | 25 | 1 | 8 | 16 | 26 | 62 | -36 | 11 |